# So kom Kári



*Kári Sverrison spældi bæði eldri og spildurnýtt tilfar á fyrstu konsertini á G! festivalinum í gjárkvøldi*

**Fyrsta live framførslan á G! festivalinum í gjárkvøldi gav eina góða kenslu av, at hetta verður eitt gott vikuskifti**

G!
*Meinhard Jensen*

Í sólskini byrjaði live-parturin av G!Festivalinum 2007 við Kára Sverrison.

"So kom várið." Tað vóru fyrst sungnu orðini á G!Festivalinum í ár. Kári Sverrisson sang 12 sangir á spæliplássinum, sum er ein nakað minni pallur, enn tann á sandinum.

Sólin skein inn á pallin alla konsertina, og saman við framúr góða tónleikinum gav tað eina góða kenslu av, at hetta verður eitt gott vikuskifti.

Helvtin av sangunum var av fløguni "Meðan vit nærkast jørðini," og einir tríggir eru ikki útgivnir, so tað var nýtt tilfar.

Tá konsertin var komin væl í helvt, kom Jens Thomsen á pallin og spældi undir ein sang. Tað var sangurin "Fjøllini standa úti", sum Jóanes Nielsen hevur skrivað orð til. Ljóðførið hjá Jens var ein hegnpeli, sum var riggaður til sum ein kontrabassur.

Rímiliga fitt av fólki var til konsertina, og øll lótu væl at framførsluni.

# Gunnar sveimaði

G!
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Annað navnið á Spæliplássinum á G! festivalinum í gjárkvøldið var Gunnar Guttesen, sum tók yvir eftir Kára Sverrison. Afturat sær hevði Gunnar Guttesen Kristoffur Mørkøre á bass og Brandur Jacobsen á trummum.



*Gunnar Guttesen man vera ein av Føroya dugnaligastu klaverspælarum*

### Tríggir úrmælingar

Gunnar hevur í nógv ár verið mettur sum ein av okkara dugnaligastu klaverspælarum. Hann hevur mest spælt fyri onnur, men fyri eini tíð síðani traðkaði hann fram sum einstaklingur. Hetta hevur hilnast ótrúliga væl.

At byrja við, tá ið Gunnar við manning fór á pall, var ljóðið á Spæliplássinum einki serligt. Hetta batnaði tó munandi, sum framførslan leið.

Brandur og Kristoffur leggja eina sera fasta (tighta) grund, sum ger tað møguligt hjá Gunnari at brilliera á ljómborðinum. Tónleikurin er eitt sindur sveimandi og hevur eitt stórt ljóð, hóast teir einans eru tríggir. Og tað var meiri enn eina ferð, at tankarnir leitaðu til bólkin Muse.

Allir tríggir eru úrmælingar á sínum øki, men tað tóktist eitt sindur sum um, at teir ikki heilt vóru nóg væl samanspældir, og ikki vóru heilt tryggir við, nær tey ymsu skiftini skuldu fara fram.

Gunnar hevur evni sum fáur, og at kalla hann eitt tónlistarligt flogvit er ikki at gera av.



*Jensina fekk heiðurin at vera tann fyrsta, ið hevur framført í Grundini – nýggja pallinum á G! festivalinum*

# Stuttlig og væl uppløgd Jensina

**Ein sera væl uppløgd og stuttlig Jensina spældi á nýggja G! pallinum, Grundin.**

**G!**
***Petur Háberg***
***petur@sosialurin.fo***

**Grundin er tann nýggi pallurin á G! Ætlanin er at nýta hann sum eitt uttandura diskotek og ein singer/songwriter-pall.**

**Jensina fekk heiðurin at vera tann fyrsta, ið hevur framført í Grundini. Og tí kom hon eisini sera væl frá.**

**Sjálvt um tað ikki átti at borið til, so byrjaði Jensina 20 minuttir ov seint vegna tekniskar trupulleikar. Eitt sindur vánaligt av ljóðfólkunum, haldi eg. Men Jensina dugdi væl og prátaði við fólkið.**

**Saman við systrini Onnu Mariu Olsen, ið sang aftanfyri, spældi hon egnar sangir. Jensina virkaði trygg og sá út til at njóta tað. Stílurin er rættur sangskrivarastílur, og tað er ikki av tilvild, at hon vann seinastu singer/songwriter kappingina, sum Hafnia árliga skipar fyri.**

**Hon syngur væl og spælir hegnisliga upp á gittar. Ein hugnalig og væleydnað framførsla, hóast tekniskar trupulleikar.**

# Gestir betri enn í fjør



*Gestir spældu á heimavølli á sandinum í Syðrugøtu*

**Gestir fingu æruna at spæla fyrstu konsertina á sandinum á G! 2007, har teir á heimavølli høvdu eina sum heild fína konsert**

G!
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Hóast konsertin á sandinum í gjárkvøldi kanska ikki var tann besta, Gestir hava spælt, so hildu fólk, at teir vóru væl betri enn á G! í fjør. Hesuferð spældu teir bæði nýggjar sangir og eisini tilfar av fløguni "Burtur frá toftunum".

### Gestir glógvaðu

Nýggju sangirnir vóru eitt sindur meira popputir; og eisini hava Gestir fingið eitt elekroniskt element við í tónleikin, sum riggaði sera væl.

Løturnar, tá ið teir løgdu nógva orku í, og tónleikurin rættiliga eksploderaði, vóru løturnar, tá ið Gestir rættiliga glógvaðu. Annars tyktist tað kanska, sum teir til tíðir høvdu ilt við at røkka út um tann nýggja – og sera stóra – pallin.

Ljóðið var gott, og tað riggaði væl at hoyra Gestir í stóra ljóðanlegginum á sandinum.

Í byrjanini vóru ikki so nógv fólk, men sum frá leið legðist til, og fólk vóru sum heild nøgd við konsertina.